Tilmæli

Noreg, Ísland og Spania mæltu til, at kapittulin í revsilógini um kynslig brotsverk verður nútímansgjørdur, m.a. soleiðis, at neyðtøka innanfyri hjúnaband eisini verður revsiverd.

Pólland mælti til, at ein óheftur mannarættindastovnur verður settur á stovn í Føroyum.

Benin mælti til, at ein óheft mekanisma at verja rættindi hjá børnum verður sett á stovn í Føroyum.

Ísland mælti til, at hjúnabandslógin verður broytt, soleiðis at tvey fólk av sama kyni kunnu gifta seg í Føroyum.

Estland mælti til, at arbeitt verður fyri, at føroysk (og grønlendsk) børn fáa betri atgongd til útbúgving.

Uppfylging

Støða verður nú tikin til tilmælini, ið verða svarað, tá ið Mannarættindaráðið hittist aftur í juni 2016.